# Illgruni um fosfat í klippfiski

Norska matvørueftirlitið kannar illgruna um, at norsk virkir hava brúkt fosfat, tá tey hava virkað klippfisk. Kanningin er sett í verk eftir áheitan frá ESA, sum er eftirlitsstovnurin hjá EFTA-felagsskapinum, ið Noreg er limur í. Fosfat bindur vatnið í fiskinum og økir tískil vektina, og tað er ólógligt sambært reglunum, skrivar Dagsavisen. Onnur siga, at fosfatið verður brúkt fyri at fáa blóðið úr fiskinum. Matvørueftirlitið sigur, at ESA hevur fingið eina kæru um, at norsk klippfiskavirkir hava brúkt fosfat, men eftirlitið veit ikki, hvør hevur kært, skrivar Ålesund-blaðið Sunnmørsposten.



*Ov nógv fosfat er í norskum klippfiski (Mynd: Sunnmørsposten)*

# Bryggjarí í gjaldssteðgi

Leiðslan í grønlendska bryggjarínum Greenland Brewhouse kunngjørdi í gjár, at fyritøkan er farin í gjaldssteðg. Sambært grønlendskum fjølmiðlum hevur bryggjaríið havt trupulleikar í seinastuni, og við fráboðanini um gjaldssteðg hevur leiðslan tríggjar mánaðir til at finna eina loysn. Greenland Brewhouse hevði umleið tvær milliónir krónur í halli í fjør. Tað komst í høvuðsheitum av trupulleikum við framleiðsluni og vantandi sølu í Danmark. Tann almenni grønlendski íleggingargrunnurin Greenland Venture eigur 49,5 prosent av Greenland Brewhouse.











# Fyrsta árið lagt afturum

**Nýggja Rás2 helt í gjár sín fyrsta føðingardag, og á degnum var staðfest, at pláss er fyri Rás2 í føroyska miðlaheiminum, og fólk taka væl undir við rásini**

RÁS2
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Mánadagin markeraði Rás2 sín 1 ára føðingardag. Tað varð gjørt við serligari føðingardagssending á Rás2, og í Miðlahúsinum, har útvarpsstøðin heldur til, var opið hús.

Fitt av fólki leitaði sær inn á gólvið til kaffi og føðingardagskøku, og lagið var gott á vertum og gestum.

- Vit merkja ein stóran áhuga fyri Rás2 frá bæði lurtarum og lýsarum, og tað gevur okkum mót upp á at halda fram við rásini. Fyrsta árið hevur gingið væl, og eg haldi eisini, at útlitini eru hampuliga góð, sigur Jonhard Hammer, stjóri á Rás2.

Rás2 hevur sent undir nýggju eigarunum síðani fyrst í oktober mánaði í fjør. Rásin sendir hvønn dag, og serliga gerandisdagar eru nógvar sendingar á skránni.

Nú stendur nýggjur vetur fyri framman, og leiðslan á Rás2 hevur boðað frá, at ymiskt nýtt verður á skránni næstu mánaðirnar.

- Vit skulu framhaldandi verða tann fríska útvarpsstøðin, sum ger útvarp her-og-nú, sigur Jonhard Hammer, stjóri.













